# Býráðsfundur 30.05.2023

**<u>Býráðsfundur 30.05.2023 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 44/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Bókasavnið | ALMENT |
| Mál nr. 45/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 46/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 47/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Jaspur Langgaard | ALMENT |
| Mál nr. 48/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Jóhan Eivind Restorff Mouritsen | ALMENT |
| Mál nr. 49/2023 – Reguleringar til fíggjarætlanina 2023 2. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 50/2023 – Alment WC í Mathias´sa Pakkhúsi | ALMENT |
| Mál nr. 51/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 52/2023 – Nema Vátta | ALMENT |
| Mál nr. 53/2023 – Uppskot til staðseting av nýggjum fongsli | ALMENT |

# Býráðsfundur 30.05.2023

**Mál nr. 44/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Bókasavnið ALMENT**

J.nr.: 1107-1-2023

Fíggjarætlanin fyri 2024 hjá Bókasavninum í Nes kommunu er komin til ummælis.

**Høvuðstølini eru hesi:**

| | **2024** | **2023** |
|---|---:|---:|
| Lønir | 76.000,- | 76.000,- |
| Húsaútreiðslur | 4.500,- | 4.500,- |
| Fólkabókasavn | 71.000,- | 71.000,- |
| Skúlabókasavn | 40.000,- | 40.000,- |
| Aðrar útreiðslur | 72.500,- | 72.500,- |
| **Útreiðslur í alt** | **264.000,-** | **264.000,-** |
| | | |
| **Inntøkur:** | | |
| Kommunustudningur | 203.500,- | 203.500,- |
| Hølisvirði | 4.500,- | 4.500,- |
| Landskassastuðul | 56.000,- | 56.000,- |
| **Inntøkur í alt** | **264.000,-** | **264.000,-** |
| | | |
| Útreiðslur tilsamans | - 264.000,- | |
| Inntøkur tilsamans | 264.000,- | |
| | | |
| **Úrslit samb. fíggjarætlan 2024** | **0,-** | |

**Á fundi tann 16.05.2023 mælir Mentanarnevndin til at góðkenna fíggjarætlanina sum hon er uppsett.**

**Á fundi tann 23.05.2023 mælir Fíggjarnevndin til at góðkenna fíggjarætlanina sum hon er uppsett.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

.

**Mál nr. 47/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Jaspur Langgaard ALMENT**

J.nr.: 1201-5-2023

Í teldubrævi, dagfest tann 03.05.2023, søkir Jaspur Langgaard um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699bg.

Talan er um ein bygning í tveimum hæddum. 9 x 14m við slættari tekju.
Hvør hæddin verður ein íbúð fyri seg.

Pláss verður fyri minst 4 p-plássum vestanfyri bygningin.

**Á fundi tann 17.05.2023 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært innsendu tekningum dagfestar 27.04.2023.**

**Býráðið samtykti einmælt at játta byggiloyvi sambært innsendu tekningum dagfestar 27.04.2023 við tí treyt, at byggisamtyktin verður broytt.**

**Mál nr. 48/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Jóhan Eivind Restorff Mouritsen ALMENT**
J.nr.: 1201-6-2023

Í teldubrævi, dagfest tann 12.05.2023, søkir Jóhan Ejvind Restorff Mouritsen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 408b.

Talan er um eittplanshús. 11 x 14,30m við slættari tekju.
Pláss verður fyri 3 p- plássum sunnan fyri húsini.

**Á fundi tann 17.05.2023 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært innsendu tekningum dagfestar 10.05.2023.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 49/2023 – Reguleringar til fíggjarætlanina 2023 2. viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1107-2-2022

Viðvíkjandi at flyta játtan til íløgur frá 2022 til 2023 og eykajáttanir.
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið íløgurnar, ið vórðu játtaðar í 2022, men sum ikki vórðu nýttar, tí arbeiðið varð seinkað, og mælir til, at hesin peningur verður fluttur til 2023, og at hesar eykajáttanir verða gjørdar:

**Flutt frá undanfarna árið**

| | |
|---|---|
| §3 Barnagarður máling | 268.000 |
| §5 Svimjihøllin Ventilatión | 483.000 |
| §5 Svangaskarð | 132.000 |
| §6 Reinsiverkið Brunnarnir | 140.000 |

# Býráðsfundur 30.05.2023

| | |
|---|---|
| §6 Reinsiverkið Agrigat | 279.000 |
| §6 Spillvatnsætlan íløga | 100.000 |
| §6 Veg Heygsvegur | 1.396.000 |
| §7 Havnin íløga Oyrarnar | 4.699.000 |
| **Í alt** | **7.497.000** |

**Játta eyka íløgur**

| | |
|---|---|
| §4 Tofta skúli útiøkið | 200.000 |
| §5 Svangaskarð fitnes | -156.000 |
| §5 Svangaskarð | 156.000 |
| §6 Byggibúning | -2.342.000 |
| §6 Reinsiverkið Brunnarnir | 100.000 |
| §6 bil | 100.000 |
| **Í alt** | **-1.942.000** |

**Játta eyka rakstur**

| | |
|---|---|
| §1 Tekniski leiðarin | 450.000 |
| §1 Talgildu Føroyar | -70.000 |
| §2 Heilsumiðstøðin | 38.000 |
| §2 Serflutningst. | 30.000 |
| §2 Roðin | 177.000 |
| §2 Barnavernd | 12.000 |
| §3 Stuðul til serligan tørv | 100.000 |
| §5 Kvøldskúlin | 186.000 |
| §5 Mentan 1500 íbúgvar | 120.000 |
| §6 Vegur við Kornvatn | 200.000 |
| §6 Viðlh. Bilar og rakstrarg. | 60.000 |
| §7 Talgildu Føroyar | 70.000 |
| §7 Havnin endurgjald | 90.000 |
| **Í alt** | **1.463.000** |

**Fíggjarnevndin mælir sostatt til, at kr. 7.497.000 verða fluttar frá undanfarna árið, kr. -1.942.000 verða játtaðar eyka til íløgur og kr. 1.463.000 játtaðar eyka til rakstur í alt kr. 7.018.000. Eykajáttanin verður fíggjað við at kr. 9.000.000 av láninum ið ikki vórðu nýttar í 2022 verða fluttar til 2023.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt á Býráðsfundi 24.04.2023.**

**Á fundi tann 23.05.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum við 2. viðgerð.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt og tikið var undir við 2. viðgerð av reguleringunum til fíggjarætlanina 2023.**

**Mál nr. 50/2023 – Alment WC í Mathias´sa Pakkhúsi ALMENT**
J.nr.: 1106-3-2023

Í samband við at Undirhúsið hevur yvirtikið og nú umvælir Mathias´sa pakkhús, hevur Nes kommuna kannað møguleikarnar fyri at innrætta og hava eitt alment wc í kjallaranum. Peningur til innrætting er avsettur á fíggjarætlini fyri 2023.

Partarnir eru vorðnir samdir um eina avtalu, sum verður løgd fyri politiska myndugleikan til góðkennigar.

Avtalan inniber, at kommunan innrættar eitt hølið í kjallarhæddini til wc og undirskrivar eina leiguavtalu, sum fevnir um eitt tíðarskeið á 20 ár, har Nes kommuna fær loyvi at leiga kjallaran fyri kr. 4.000 mánaðarliga. Hetta er áleið sama upphædd, sum Nes kommuna seinastu árini hevur stuðlað Undirhúsinum við fyri leiguna, har Undirhúsið leigar í dag. Leiguupphæddin verður prístalsviðgjørd fjórða hvørt ár. Kommunan innrættar wc og hevur ábyrgd av allari reingerð og viðlíkahaldi av wc´inum.

**Á fundi tann 17.05.2023 mælir Tekniska nevnd til at taka undir við uppskotinum til avtalu við Undirhúsið um alment wc í Mathias´sa pakkhúsi.**

**Á fundi tann 23.05.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, at íløgan verður tikin av stovninum ”Sparkivallir og spælipláss íløga”, at leigan framyvir verður tikin av stovninum ”Stuðul til Mentan”/Undirhúsið.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 52/2023 – Nema Vátta ALMENT**
J.nr.: 1101-7-2023

Nes kommuna hevur fingið tilboð frá Nema uppá skipanina Nema Vátta. Skipanin hevur við sær, at bókhaldið hjá Nes kommunu gerst talgilt.

Um Nema Vátta verður sett í verk, so fara tey, sum vanliga vátta og góðkenna, framvegis at vátta sínar rokningar, men umvegis teldu ella telefon. Góðkenningarmøguleiki er innbygdur í skipanini, so at borgarstjórin og roknskaparleiðarin ella onnur, framvegis kunnu góðkenna váttaðar rokningar.

Roknskaparleiðarin metir, at hetta fer at lætta munandi um hjá bókhaldaranum, so at betri tíð verður til aðrar uppgávur.

Roknskaparleiðarin mælir til at seta skipanina í verk.

**Á fundi tann 23.05.2023 mælir Fíggjarnevndin til seta skipanina í verk og at fíggingin verður tikin av stovninum ”Kommunuskrivstovan”.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 53/2023 – Uppskot til staðseting av nýggjum fongsli ALMENT**

J.nr.: 2501-1-2023

Borgarstjórin bað um loyvi at seta málið á skrá, og tað var einmælt samtykt.

Løgmálaráðið hevur heitt á føroysku kommunurnar um at bjóða seg fram, nú nýtt fongsul skal byggjast í Føroyum. Borgarstjórin, formaðurin í Teknisku nevnd og kommunuskrivarin vóru á kunnandi fundi, tann 14.03.2023, sum Løgmálaráðið skipaði fyri.

Har var ført fram, at uppskot um staðseting skulu vera Løgmálaráðnum í hendi innan 01.06.2023.

Formaðurin í Teknisku nevnd skjýtir upp øki sunnanfyri Blákrossheimið ella øki í Fossdali sum staðseting í Nes kommunu.

**Á fundi, tann 12.04.2023, mælir Tekniska nevnd til at bjóða festarunum á fund við Teknisku nevnd at umrøða málið.**

Tann 26.05.2023 var kunnandi fundur á kommunuskrivstovuni, har ætlanirnar vórðu lagdar fyri Hans Jákup Hansen, formann í hagastýrinum fyri Nes haga.

Formaðurin í Teknisku nevnd mælir til, at vísa á øki sunnanfyri Blákrossheimið og á økið í Fossdali.

**Býráðið samtykti einmælt at vísa Løgmálaráðnum á økið sunnanfyri Blákrossheimið og á økið í Fossdali.**